# KOMMUNUSAMSKIPAN FØROYA
# ÁRSFRÁGREIÐING 2007

Ársfráðgreiðingin gevur kommunum, landsmyndugleikum, samstarvsfeløgum og almenninginum sum heild innlit í virksemið hjá KSF farna árið eins og kunning um ymisk føroysk kommunuviðurskifti.

Kommunusamskipan Føroya

## Innihaldsyvirlit


Frágreiðing um virki felagsins í farna ári og um framtíðarætlanir . . . . . . . . . . . . . 5

Ársroknskapur 2007 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 10

Kommunal búskaparviðurskifti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13

Íbúgvar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 15

Brot úr virkseminum farna árið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 17

Hoyringar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 20

Um KSF . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 21

Umboð fyri KSF í ráðum, nevndum v.m. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 22



Heðin Mortensen
Formaður

# FRÁGREIÐING UM VIRKI FELAGSINS Í FARNA ÁRI OG UM FRAMTÍÐARÆTLANIR

**Politiska virksemið hjá KSF í 2007 var í stóran mun merkt av valinum til løgtingið. Nógv lógar- og kunngerðaruppskot hava verið til hoyringar umframt nógvar samráðingar við landsstýrið.**

Hetta kom ikki óvart á KSF. Í 2006 legði KSF eina langtíðar arbeiðsætlan við málum fyri útlegging av uppgávum og framtíðar kommunufíggingini. Í hesum sambandi vóru flestu tættir í viðurskiftunum millum land og kommunur viðgjørdir. Stýrið hevði í hesum sambandi fund við øll kommunustýrini á vári 2007. Rundferðin staðfesti breiða semju um raðfestingarnar.

Raðfestingin er í høvuðsheitum, at skúlaøkið og fólka- og skúlabókasøvn skulu leggjast út til kommunurnar fyrst. Síðani skal eldrarøktarøkið leggjast út, og seinni aftur skulu onnur málsøkið leggjast út eitt nú primerar heilsutænastur og ávísar almannaveitingar.

## Uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur

Arbeiðsætlanin hjá KSF legði upp til samráðingar við landsstýrið um skipaða tilgongd at fáa uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur avgreitt.

Tíverri tók landsstýrið ikki av. Hetta hóast, at løgtingið samtykti at skipa Føroyar sum eitt valdømi, har ein høvuðsgrundgeving var, at nú skuldi løgtingið reka landspolitikk, og at kommunurnar skuldu skipast í fíggjar- og umsitingarliga sterkar eindir at standa fyri kommunalpolitikkinum.

Nú tíggju ár eru liðin síðani grøna kommunuálitið, er framvegis langt eftir á mál. Tó at ávís mál eru rokkin, so eru trupulleikarnir eitt nú á skúlaøkinum og eldrarøktarøkinum nú vorðnir so stórir og grundleggjandi, at tað er alneyðugt við samráðingum millum land og kommunurnar til tess at skipa samfelagið betri og greiðari.

## Skúlaøkið

Vánaligu PISA-úrslitini settu fólkaskúlan á breddan, og í 2007 hevði løgtingið aðalorðaskifti um fólkaskúlan. Táverandi landsstýrismaður í mentamálum staðfesti í hesum sambandi, at kommunurnar eiga at umsita fólkaskúlan. Hann vísti m.a. á, at kommunali myndugleikin skal hava størri ávirkan á viðurskiftini í fólkaskúlanum, og at tað skulu vera kommunurnar, sum avgera, hvussu skúlaskapurin í kommununi verður skipaður og raðfestur útyvir lógarásett minstukrøv.

Støðutakanin hjá landsstýrismanninum varð eisini í samsvari við tey tilmæli, ið m.a. KSF og Lærarafelagið høvdu latið Mentamálaráðnum. Landsstýrismaðurin hevði tó ikki undirtøku fyri hesum í samgonguni, og tí er framvegis einki hent á økinum.

Øllum er greitt, at ógreiða uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur er ikki til gagns fyri fólkaskúlan. Eitt dømi um hetta er málið um skeiðsútreiðslur hjá lærarum. Mentamálaráðið eigur sum arbeiðsgevari greitt allar útreiðslur til førleikamenning, endurútbúgving v.m. av lærarum, men landið hevur fyri fleiri árum síðan kastað ábyrgdina frá sær. Tað tykist, sum um at landið bara gongur út frá, at kommunurnar gjalda kortini. Hetta er óvirðiligt.

Støðan í dag er tann, at Mentamálaráðið megnar als ikki at umsita fólkaskúlan. Mentamálaráðið eigur heldur ikki at umsita fólkaskúlan, tí at Mentamálaráðið hevur sum stjórnarráð heilt aðrar uppgávur at loysa viðvíkjandi fólkaskúlanum – at gera tað lógarfyrireikandi arbeiðið, at hava eftirlit og at skipa fyri eftirmetingum og kanningum v.m.

Tað er nevniliga vert at taka við í kjakið um fólkaskúlan, at rættartrygdin hjá næmingum, foreldrum eins væl og lærarum, er als ikki tryggjað í núverandi skipan. Mentamálaráðið er bæði umsitingarligur myndugleiki, eftirlitsmyndugleiki og kærumyndugleiki alt í einum.

Hetta er óhaldbart og orsøk nóg týdningarmikil til, at umsitingin av skúlanum eigur at verða løgd út til kommunurnar. So er í øllum okkara norðurlendsku grannalondum, tí bert á henda hátt ber til at skipa tað greiða umsitingarliga ábyrgdarbýtið, ið er avgerandi fortreyt fyri allari fakligari menning í fólkaskúlanum – og rættartrygdini.



**KOMMUNURNAR STANDA FYRI ALSAMT STØRRI PARTI AV SAMLAÐA ALMENNA VIRKSEMINUM, OG MENNINGIN ER STÓR Á ØLLUM ØKJUM**

## Eldrarøktarøkið

Uppskot til tvær kunngerðir, onnur um eldrasambýli og hin um røktarheim, elvdu til stóra ónøgd úti í kommununum, og KSF mótmælti eisini harðliga. Kunngerðirnar tóku í veruleikanum kommunurnar av ræði, bæði yvir egnum ognum og sínum eldru borgarunum.

KSF vísti á, at vaksandi tørvurin á eldrarøkt fór ikki at verða loystur við at krøkja kommunurnar av allari ábyrgd, so sum avleiðingin av kunngerðunum fór at verða. KSF kravdi tí landsstýrismannin til samráðingarborðið, og nýggj uppskot vórðu orðað.

Tó at KSF als ikki fegnaðist um nýggju uppskotini heldur, so góvu tey í størri mun kommununum trygd fyri, at fastbúgvandi í kommunu, ið eigur eldrasambýli ella røktarheim, hevur framíhjárætt til upptøku á teirra eldrasambýli og røktarheimi.

Eins og á skúlaøkinum er hugurin stórur hjá landinum at flyta útreiðslur yvir á kommunurnar, sum tær einki eiga í og onga ábyrgd hava av. Dømi vóru um hetta eisini í 2007.

KSF hevur fleiri ferðir víst á, at sera ógreiða støðan viðvíkjandi uppgávu- og ábyrgdarbýtinum og vantandi langtíðarætlanir á eldrarøktarøkinum er ikki nøktandi. Her mugu land og kommunur seta seg saman og finna loysnir, sum bera og røkka.

## Fólka- og skúlabókasøvn

Mentamálaráðið setti á vári 2007 arbeiðsbólk at endurskoða bókasavnslógina, tó serliga stuðulsskipanina til fólka- og skúlabókasøvn, ið varð broytt beint undan jólum 2005, og uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur. Arbeiðsbólkurin legði í oktober 2007 fram álit til landsstýrismannin í mentamálum.

Mælt varð m.a. til, at kommunurnar yvirtaka alla ábyrgd av fólkabókasøvnum og skúlabókasøvnum. Harumframt varð mælt til, at kommunurnar skulu bera allan raksturin av fólkabókasøvnum, tó við møguleika fyri verkætlanarstuðli og stuðli til bygging v.m. úr landskassanum eins og nú. Landið skal tó framhaldandi lata stuðul til skúlabókasøvn.

Endamálið er bæði at styrkja kommunalu fólkabókasavnstænastuna sum heild, og at landið – í øllum førum so leingi ábyrgdin av samlaða skúlaøkinum er tvíbýtt – verður við til at fíggja tey alsamt herdu krøvini til skúlabókasøvn. Málið er tíverri steðgað upp í Mentamálaráðnum.

## Elveitingarlóg og havnalóg

Uppruna uppskotið til elveitingarlóg hevði kollveltandi avleiðingar fyri kommunurnar, fyrst og fremst viðvíkjandi ognar- og ræðisrættinum yvir SEV og sjálvum elkervinum. Tað eydnaðist at fáa broytt uppskotið soleiðis, at betri javnvág varð millum yvirskipaðu heimildirnar hjá landsstýrinum og so tað, at SEV og kommunurnar fingu ein meira framskotnan leiklut, sum samsvaraði betri við ognarviðurskiftini.

Í mong ár hevur KSF strongt á landsstýrið um at fáa nýggja havnalóg, sum er tillagað teimum viðurskiftum, ið havnir og kommunur virka undir í dag. Í oktober legði landsstýrið uppskot til havnalóg fyri tingið. KSF hevði virknan leiklut í lógarfyrireikandi arbeiðinum, men tíverri lá havnalógin eftir, tá ið tingið fór til hús í ótíð.

Umframt tær átrokandi dagføringarnar, er eitt av høvuðsáhugamálunum hjá KSF at fáa lagaligari karmar at skipa havnavirksemið innanfyri, herundir at skipa havnavirksemið í partafelagsformi á handilsligum grundarlagi. Hetta snýr seg ikki um at miðsavna ella at monopolisera alt havnavirksemið, sum onkur hevur róð uppundir, men at geva kommununum og havnunum bestu møguleikar at skipa seg bygnaðarliga í mun til virksemið.

Kommunalu havnirnar í Føroyum eru portrini til alt sjóvegis samskifti og samhandil við útheimin, og tí er neyðugt, at havnirnar hava bestu karmar at veita fullgóðar havnafasilitetir, eisini til tess at standa seg í kappingini við havnir í okkara grannalondum. Eisini av hesi orsøk metir KSF, at lógin er átrokandi neyðug.

## Felags fíggjarkarmar við landið

Kommunali búskapurin sum heild hevur verið nógv umrøddur farna árið. Kommunurnar standa fyri alsamt størri parti av samlaða almenna virkseminum, og menningin er stór á øllum økjum.

Heldur enn at frøðast um hesa gongd, hevur Búskaparráðið fýlst á, at einki tamarhald er á kommunalu fíggjarviðurskiftunum. Orsøkin er fyrst og fremst, at kommunali búskapurin eftir teirra tykki er ov góður. Landsstýrið tók í sínum lagi táttin upp við ábreiðslum um, at kommunurnar yvirhita føroyska búskapin.

Nýggi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, ið varð tilnevndur á vári 2007, setti sær fyri at tálma útreiðslurnar hjá kommununum við avtalu um felags útreiðslukarm við landskassan.

Her búði tó ein nógv meira kollveltandi

ætlan undir. Henda ætlan var í tveimum. Skipanin við mvg-afturbering til kommunurnar skuldi stigvíst avtakast. Við støði í 2006-tølum hevði hetta kostað kommununum umleið 120 mió kr. árliga. Hetta svarar til meira enn 10% av samlaðu kommunalu skattainntøkunum. Ein broyting í skattaskipanini skuldi hinvegin fíggja eina kommunala útjavningarskipan uppá umleið 70 mió kr. um árið.

Avtøkan av mvg-afturberingarskipanini hevði eittans endamál – at taka broddin av kommunalu fíggjarorkuni, sum kommunurnar skynsamt hava bygt upp síðan kreppuárini, og í staðin beina hesar 120 mió kr. eyka niður í landskassan. Gjøgnum útjavningarskipanina skuldi landið harumframt seta seg á stýringina av øðrum 70 mió kr. árliga.

Tó at útgangsstøðið hjá landsstýrinum var samráðing um felags fíggjarkarm, so høvdu hesi bæði uppskot í veruleikanum einki við tað at gera. KSF mótmælti ógvisligu og óneyðugu inntrivini í fíggingargrundarlagið hjá kommununum. Víst varð á, at avleiðingin fór at vera eitt munandi skert kommunalt tænastustøði. Tað vísti seg seinni, at landsstýrismaðurin hevði ikki undirtøku fyri ætlanunum í samgonguni.

Roknskaparkunngerðin við nýggja kommunala kontustronginum er framvegis ikki sett í gildi. Enn manglar at gera talgildu innrapporteringsskipanina, ið verður grundarlag fyri kommunalu fíggjarkunningarskipanini. Allar kommunur skulu mánaðarliga lata Fíggjarmálaráðnum ávíst roknskapartilfar, og á henda hátt ber til at hava eina meira dagførda mynd av kommunalu fíggjarviðurskiftunum eins og hjá landinum.

Hesar upplýsingar verða kunningar- og fíggjarstýringsamboð bæði hjá landsstýrinum og kommununum. Hjá landsstýrinum fyrst og fremst í mun til at hava yvirlit yvir samlaða almenna búskapin og sum grundarlag fyri samráðingum um fíggjarviðurskifti við kommunurnar. Kommunurnar kunnu harumframt brúka upplýsingarnar sum samanberingargrundarlag millum kommunur.

## Framtíðarætlanir

Í síðstu ársfrágreiðing varð staðfest, at kommunurnar standa við fleiri avgerandi markamót bæði viðvíkjandi kommunubygnaðinum, uppgávu- og ábyrgdarbýtinum millum land og kommunur og yvirskipaðu fíggjarligu karmunum.

Við støði í samgonguskjalinum hjá nýggja landsstýrinum kann staðfestast, at landsstýrið hevur ongar orðaðar ætlanir um útlegging av uppgávum til kommunurnar at umsita. Boðskapurin er, at fyrst skulu kommunurnar finna saman í størri kommunur, og ein útjavningarskipan skal verða komin upp at standa, ið harafturat skal virka til fulnar.

Veruleikin er, at í landsstýrinum er ikki semja um, hvønn leiklut kommunurnar yvirhøvur skulu hava, og tí velur landsstýrið einki at gera.

Tað er tó púra greitt sambært samgonguskjalinum og teimum fráboðanum, ið higartil eru komnar fram, at landsstýrið fer at krevja munandi strangari stýring á kommunala búskapinum. Sagt verður, at bindandi avtalur skulu framyvir gerast um rakstur og íløgur, eins og felags fíggjarstýring og roknskaparreglur skulu gerast.

Verður bert lurtað eftir retorikkinum frá eitt nú nýtilnevnda landsstýrismanninum í fíggjarmálum, so fær almenningurin ta fatan, at tað er eingin fíggjarstýring úti í kommununum. At útreiðslurnar bara økjast uttan mið og mál, og at landstýrið tí noyðist at stýra virkseminum úti í kommununum.

Tað er vert at endurtaka, at samlaði kommunubúskapurin er sunnur og hevur tað gott. Kommunurnar við einstøkum undantøkum hava góða fíggjarorku, lága skuld og vaksandi inntøkur, hóast at kommunuskattatrýstið hevur verið so at siga óbroytt í fleiri ár. Hetta er úrslit, ið fyrst og fremst er grundað á skynsama kommunalpolitiska fíggjarstýring, og tey stýringsamboð, sum landið umvegis kommunustýrislógina longu hevur.

Hetta er í sjálvum sær ein sólskinssøga og besta prógvið um, at kommunala skipanin virkar, sum hon skal. Tað er skylda og neyðugt hjá kommunum at veita góðar karmar um vælferðina, tað veri seg barnaansing, útbúgving, eldrarøkt, sóttreinsað vatn og renovatión. Kommunurnar skulu eisini síggja til trivnaðin á staðnum eins og til umstøðurnar hjá vinnulívinum. Gera kommunurnar ikki tað, steðgar menningin upp – ikki bara lokalt, men í øllum samfelagnum.

Víst eru útreiðslurnar bæði til rakstur og íløgur vaksnar. Men so eru uppgávurnar, serliga tær lógarbundnu, ið landið ásetir við alsamt størri neyvleika, eisini. Og tænastustøðið hjá kommununum er eisini vorðið munandi betri. Landsstýrið kann ikki bæði blása og hava mjøl í munninum í senn – fyrst at leggja uppgávur og krøv til umsitingina av teimum út á kommunurnar, og so harta

tær fyri at brúka neyðuga peningin til tess at røkja uppgávurnar.

Verður hugt nærri eftir rakstrar- og íløguútreiðslunum farnu árini, so eru tað serliga tvey øki, ið er vaksin munandi, nevniliga skúla- og mentamál og almanna- og heilsumál. Ætlaðu rakstrarútreiðslurnar í 2008 til hesi bæði øki eru 319 mió kr. hægri enn í 2000, og ætlaðu íløgurnar eru 276 mió kr. hægri. Umleið 60% av kommunalu fíggjarætlanunum fyri 2008 fara til skúla- og mentamál og almanna- og heilsumál.

Hetta eru kjarnuøkini í kommunalu vælferðartænastunum – sjálvt grundarlagið undir samfelagnum, og tølini eru týðulig prógv um, at kommunurnar raðfesta hesi øki sera høgt.

Tað er eisini vert at gera vart við, at lutfalsligu útreiðslurnar til kommunala umsiting eru ikki vaksnar nakað yvirhøvur hesi árini. Hetta er bert enn eitt dømi um skilagóða fíggjarstýring.

Eingin orsøk er sostatt hjá landsstýrinum til at skerja fíggjarliga sjálvræðið hjá kommununum. Slík detailstýring fer at raka kommunala tænastustøðið sera meint – fyrst og fremst tey bleytu virðini, vælferðartænasturnar, sum fylla nógv mest í kommunalu fíggjarætlanunum.

Hetta ganga kommunurnar ikki við til. Landsstýrið eigur at vita, at hetta er als ikki vegurin at ganga, skulu vit fáa fólk at støðast í Føroyum og menna samfelagið.

Kommunalu fíggjarviðurskiftini – og tær raðfestingar, ið kommunustýrið ger, er fyrst og fremst eitt mál millum kommununa og hennara borgarar, og hesa fólkaræðisligu skipan eigur landsstýrið sjálvandi at virða. Verða virkis- og fíggjarligu møguleikarnir hjá kommununum skerdir, so verða tað fyrst og fremst borgararnir, ið verða raktir – børnini, tey ungu, foreldrini, búreisingarnir og ikki minst tey eldru.

Tað er tí eisini umráðandi, at okkara borgarar eru á varðhaldi og síggja til, at kommunurnar framhaldandi hava neyðugar karmar at menna tænastustøðið enn meir.

Í vetur hava verið samráðingar við Føroya Kommunufelag um at savna kommunurnar í ein kommunufelagsskap. KSF metir, at tíðin er komin at styrkja tað felags kommunalpolitiska virksemið, eins og tænasturnar til kommunurnar enn meira. Skulu vit skipa eitt betri og greiðari samfelag, er neyðugt við sterkum felagskommunalum stevi í samskiftinum við landsmyndugleikarnar.

Í heyst verður kommunustýrisval. Styrkin í kommunuskipanini er borgaraluttøkan – tað lokala fólkaræðið, har borgarin hevur ítøkiliga ávirkan á kommununa og tær tænastur, ið kommunan bjóðar. Tilboðini og loysnirnar taka støðið í lokalu umstøðunum, og hetta er forteytin fyri menning, trivnaði og samleikanum á staðnum – og harvið eisini ymiskleikanum millum kommunur.

Gjøgnum KSF læra vit av hvørjum øðrum, so at vit áhaldandi kunnu gera tingini enn betri – tí øll skulu vit tæna okkara borgarum á besta hátt. Hesum hevur tann góði og virkni samstarvshugur millum limakommunurnar í KSF altíð borgað fyri, og vón mín er, at so verður eisini framyvir.



Heðin Mortensen
Formaður

(t.kr.)

| RAKSTRARKOSTNAÐUR: | 2007 | 2006 |
|---|---|---|
| Lønir | -1.293.050 | -1.320 |
| Eftirløn | -154.168 | -102 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | -42.428 | -44 |
| Starvsfólkakostnaður íalt | -1.489.646 | -1.466 |
| | | |
| Viðlíkahald bygningur | -41.564 | -118 |
| El- og oljuútreiðslur | -28.742 | -18 |
| Trygging | -11.440 | -9 |
| Fundarútreiðslur | -90.841 | -82 |
| Skeiðsútreiðslur | -223.146 | -435 |
| Grannskoðan | -10.000 | -15 |
| Skrivstovulutir og -útbúnaður | -181.732 | -139 |
| Telefon | -37.946 | -31 |
| MVG | -109.505 | -56 |
| MVG at fáa endurgoldið frá kommununum (75%) | 86.550 | 42 |
| Annar kostnaður íalt | -648.366 | -861 |
| | | |
| Fíggjarligar útreiðslur | -192.983 | -145 |
| Fíggjarligir postar íalt | -192.983 | -145 |
| | | |
| Rakstrarkostnaður íalt | -2.330.995 | -2.472 |
| | | |
| Inntøkur: | | |
| Limagjøld | 1.696.201 | 1.666 |
| Endurgjald fyri skeið og annað útlegg | 256.595 | 482 |
| Endurgjald løgfrøðingur | 499.500 | 502 |
| Endurgjald fyri hølisútreiðslur | 85.000 | 83 |
| Aðrar inntøkur | 43.941 | 0 |
| Fíggjarligar inntøkur | 876 | 0 |
| Inntøkur íalt | 2.582.113 | 2.733 |
| | | |
| Ársúrslit | 251.118 | 261 |

(t.kr.)

| FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER: | 2007 | 2006 |
|---|---|---|
| **AKTIV** | | |
| Bygningur, matr. nr. 518bm | 3.958.559 | 3.904 |
| Materiell støðisogn íalt | 3.958.559 | 3.904 |
| Støðisogn íalt | 3.958.559 | 3.904 |
| Áogn hjá kommununum fyri MVG | 122.821 | 42 |
| Onnur áogn | 339.783 | 372 |
| Áogn íalt | 462.604 | 414 |
| Tøkur peningur | 139.087 | 93 |
| Ogn í umferð íalt | 601.691 | 507 |
| Aktiv íalt | 4.560.250 | 4.410 |

| PASSIV | 2007 | 2006 |
|---|---|---|
| Eginogn: | | |
| Saldo primo | 517.105 | 256 |
| Ársúrslit | 251.118 | 261 |
| Saldo ultimo | 768.223 | 517 |
| Veðskuld | 3.646.691 | 3.676 |
| Bankaskuld | 0 | 0 |
| Vøru- og tænastuskuld | 85.969 | 0 |
| Onnur skuld | 59.367 | 217 |
| Skuld íalt | 3.792.027 | 3.893 |
| Passiv íalt | 4.560.250 | 4.410 |

# KOMMUNAL BÚSKAPAR-VIÐURSKIFTI



## Kommunuskattainntøkur

Samlaðu kommunuskattinntøkurnar í 2007 vóru sambært fyribilsskránni hjá TAKS kr. 1.322.443.000. Hetta eru 63 mió kr. meira enn mett í fíggjarætlanini fyri 2007 ella beint omanfyri 5%.

Í mun til roknskapartølini fyri 2006 eru kommunuskattainntøkurnar vaksnar við 2,4% í 2007. Til samanberingar var vøksturin í 2006 heili 13,2%. Sambært kommunalu fíggjarætlanunum verður roknað við 3,4% vøkstri í 2008, verður støðið tikið í 2007-tølunum frá fyribilsskránni hjá TAKS.

## Útreiðslur

Útreiðslurnar til rakstur, íløgur, avdráttir og rentur av lánum vóru sambært kommunalu roknskapunum fyri 2006 í alt 1,4 mia kr. Harav stóð vanligi raksturin fyri 898 mió kr. og íløgurnar fyri 381 mió kr.

Sambært fíggjarætlanunum fyri 2007 vaksa samlaðu útreiðslurnar góðar 100 mió kr. ella 7,3%. Vøksturin sambært fíggjarætlanunum fyri 2008 er umleið 220 mió kr. ella 14,65%.

Tað er tó serliga íløgurnar, ið vaksa meira enn raksturin. Vanligi raksturin fer úr 898 mió kr. í 2006 til ætlaðar 948 mió kr. í 2007 – ein vøkstur uppá 5,6%. Í 2008 verður raksturin 1,04 mia kr. ella ein vøkstur uppá 10,1% í mun til 2007.

Íløgurnar eru sambært fíggjarætlanunum fyri 2007 góðar 473 mió kr. Tað svarar til ein vøkstur uppá 24,1% í mun til 2006. Íløgurnar í 2008 verða ætlandi góðar 595 mió kr. Tað svarar til ein vøkstur uppá 25,8% í mun til íløgurnar í 2007.

Gerast skal vart við, at tølini fyri 2007 og 2008 eru fíggjarætlanartøl og kunnu tí broytast nógv.

## Avdráttir og rentur

Tað var tann tíð í nítiárunum, at avdráttir og rentur stóðu fyri meira enn 29% av samlaðu kommunalu útreiðslunum. So er ikki longur. Í 2006 vóru rentur netto og avdráttir 64 mió kr. ella 4,6% av samlaðu útreiðslunum.

Tó at avdráttir og rentur hækka nakað í krónum sambært fíggjarætlanunum fyri 2007 og 2008, so veksur hetta ikki lutfalsliga í mun til samlaðu útreiðslurnar.

## Brúk av reiðum peningi og lántøka

Sum tað sæst, eru samlaðu útreiðslurnar hægri enn kommunuskattainntøkurnar. Síðan 2006 hava kommunurnar brúkt av likvidum og tikið upp lán.

Sambært roknskapunum fyri 2006 brúktu kommunurnar uml. 21 mió kr. av likvidum. Sambært fíggjarætlanunum fyri 2007 er talið 127 mió kr. Í 2008 ætla kommunurnar at brúka 146 mió kr. av likvidum.

Í 2006 tóku kommunurnar 82 mió kr. í nýggjum lánum. Í 2007 ætlaðu tær at lána 110 mió kr., meðan kommunurnar í 2008 ætla at lána 202 mió kr.

Útreiðslur og inntøkur **netto**




Kelda: Innlendismálaráðið, TAKS (fyribilsskattaskráin 2007)

Viðm.: 2004–2006 sambært grannskoðaðum ársroknskapunum, 2007–2008 sambært fíggjarætlanunum

Rakstrarútreiðslur **netto býtt á málsøki**




Kelda: Innlendismálaráðið

Viðm.: 2004-2006 sambært grannskoðaðum ársroknskapunum, 2007-2008 sambært fíggjarætlanunum

Rakstrarútreiðslur **netto býtt á málsøki í % av samlaðu rakstrarútreiðslunum**




Kelda: Innlendismálaráðið

Viðm.: 2004-2006 sambært grannskoðaðum ársroknskapunum, 2007-2008 sambært fíggjarætlanunum

Íløgur **netto býtt á málsøki**




Kelda: Innlendismálaráðið

Viðm.: 2004–2006 sambært grannskoðaðum ársroknskapunum, 2007–2008 sambært fíggjarætlanunum

## Rakstrarútreiðslur býtt á málsøki

Størsti vøksturin í rakstrarútreiðslum er innan almanna- og heilsumál, sum eisini er nógv tað største rakstrarøkið. Stóra økingin kom tó serliga í 2006 í sambandi við, at barnaverndarøkið varð lagt út til kommunurnar. Í 2007 verður vøksturin mettur til 4,7 % í mun til 2006, og í 2008 verður metti vøksturin 10,3 %.

Skúla- og mentamál vaksa serliga frá 2007 við 8,1 %. Vøksturin í 2008 verður sambært fíggjarætlanunum nakað hægri, nevniliga 11,4%.

Triðstørsta rakstrarøkið er kommunal fyrisiting, sum er vaksið úr 116 mió kr. í 2004 til 154 mió kr. í 2008. Teknisk mál liggja støðugt um tær 100 mió kr. í rakstrarútreiðslum, og byggibúning millum 60–70 mió kr.

## Lutfalsligar broytingar í rakstrarútreiðslunum býtt á málsøki

Verður hugt aftur til roknskapin 2000, so kunnu staðfestast nakrar broytingar í rakstrarútreiðslulutfallinum millum ymsu málsøkini hetta fram til fíggjarætlanirnar 2008.

Í 2000 vóru útreiðslurnar til almanna- og heilsumál 30,8% av samlaðu rakstrarútreiðslunum. Í 2008 er lutfallið 36,9%.

Skúla- og mentamál hava ligið um 23–24%, men hóast stóra nominella vøksturin frá og við 2007, so er talan um lutfalsliga lækking í 2008. Sambært fíggjarætlanunum fyri 2008 verður lutfallið 21,5%.

Sum ávíst omanfyri, so eru útreiðslurnar til kommunala fyrisiting vaksnar nominelt, men í mun til samlaðu rakstrarútreiðslurnar

er talan um so at siga nullvøkstur – úr 14,4% í 2000 upp í 14,7% í 2008.

## Íløgur

Tað er serliga innan skúla- og mentamál, at stór broyting er farin fram – serliga frá og við 2006. Fleiri stórar skúlabyggingar eru í gongd, og tað sæst týðuliga aftur í íløgunum.

Almanna- og heilsumál lógu ovast í 2004, men stóru útbyggingarnar innan barnaansingarøkið og eldrarøktina eru nú hæsaðar nakað av.

Íløgur **netto býtt á málsøki í % av samlaðu íløgunum**




Kelda: Innlendismálaráðið

Viðm.: 2004–2006 sambært grannskoðaðum ársroknskapunum, 2007–2008 sambært fíggjarætlanunum

Teknisk mál eins og kommunal virki eru vaksin síðan 2005. Stóru útbyggingarnar innan renovatión eins og krøvini til kloakk og sóttreinsað vatn síggjast aftur í hesum.

## Lutfalsligar broytingar í íløgunum býtt á málsøki

Yvir skjótt farna tíggju ára skeiðið eru stórar lutfalsligar broytingar hendar. Skúla- og mentamál stóðu árini 2000–2004 fyri umleið 20% av samlaðu íløgunum. Sambært fíggjarætlanunum fyri 2008 verður talið 44,4%.

Eisini innan almanna- og heilsumál ber til at staðfesta áhugaverda gongd. Í 2000 stóð økið fyri 9,5% av samlaðu íløgunum. Í 2004 var talið 31,3%, og nú í 2008 er tað komið niðuraftur á 10,6%. Tølini fyri 2004 stava serliga frá útbyggingum innan barnaansing og eldrarøkt.

Íløgurnar til teknisk mál hava ligið báðu megin 20%. Kommunal virki stóð fyri nógv teimum størstu íløgunum í 2000 – nevniliga 36,6%, men liggur nú á 9,7%.

## Íbúgvar

Mestsum eingin vøkstur er í fólkatalinum í Føroyum. Talvan niðanfyri vísir gongdina í limakommununum í 2007.

Vøksturin í fólkatalinum fyri alt landið er bert 0,28%, og samlaði vøksturin í limakommununum er eisini lítil, bert 0,19% ella beint undir landstalið.

Vágs kommuna hevur munandi størri lutfalsligan vøkstur í fólkatalinum enn fyri alt landið. Tórshavnar kommuna hevur eisini størri lutfalsligan vøkstur enn landsmiðal, meðan fólkatalið er lækkað í Tvøroyrar, Fuglafjarðar og Sands kommunum.

Tórshavnar kommuna telur 40,12% av Føroya fólki. Við árslok 2006 var talið 40,01%.

KSF umboðar nú 68,82% av Føroya fólki.

| | 1. jan. 2007 | 31. des. 2007 | +/-% | % av íbúgvunum 31. des. 2007 |
|---|---|---|---|---|
| Tórshavnar kommuna | 19.337 | 19.441 | 0,54 | 40,12 |
| Klaksvíkar kommuna | 4.884 | 4.889 | 0,10 | 10,09 |
| Runavíkar kommuna | 3.677 | 3.680 | 0,08 | 7,59 |
| Tvøroyrar kommuna | 1.819 | 1.799 | -1,10 | 3,71 |
| Fuglafjarðar kommuna | 1.587 | 1.545 | -2,31 | 3,19 |
| Vágs kommuna | 1.397 | 1.418 | 1,50 | 2,93 |
| Sands kommuna | 586 | 578 | -0,44 | 1,19 |
| Limakommunur KSF | 33.287 | 33.350 | 0,19 | 68,82 |
| Alt landið | 48.329 | 48.463 | 0,28 | |

Kelda: Hagstova Føroya

# BROT ÚR VIRKSEMINUM FARNA ÁRIÐ



Tekning úr projektinum um eftirskúlan í Hvalba

## SSP-samstarv

Ráðstevna varð hildin 15. juni 2007 um SSP-samstarv. Stutt eftir byrjaðu fyrireikingar at skipa SSP-samstarv í Føroyum. Hetta er skipað samstarv millum skúlaverk, sosialmyndugleikar og politi, har endamálið er at skipa eitt burðardygt kriminalfyribyrgjandi samstarv millum avvarðandi partar á økinum.

Umboð fyri løgregluna, Almanna- og heilsumálaráðið, Mentamálaráðið, kommunufeløgini og Barnaverndarstovuna hava í heyst og vetur arbeitt við at skipa samstarvið.

Stígur kom í, tá ið val til løgtingið varð útskrivað, men verður arbeiðið væntandi tikið uppaftur. Ætlanin er at seta í starv ein SSP-ráðgeva, hvørs uppgáva m.a. annað verður at samskipa ítøkiliga SSP-arbeiðið millum myndugleikar, skúlar og tænastur kring landið.

## Eftirskúlin í Hvalba

28. september 2006 lat nevndin, ið fyrireikar eftirskúla í Hvalba, Mentamálaráðnum umsókn um góðkenning av stovnsetan av Atlantic Adventure eftirskúla í Hvalba og um stuðul til bygging. Mentamálaráðið bað í januar 2007 um nærri útgreining av ávísum viðurskiftum. Hin 31. mai 2007 fekk Mentamálaráðið umbidnu útgreiningina, har tað m.a. varð mælt til fleiri broytingar í lógini um eftirskúlar.

Mentamálaráðið sendi í heyst uppskot til lógarbroytingar til hoyringar, sum fyrst og fremst snúðu seg um fíggjarligu viðurskifti kring eftirskúlan, tvs. stuðul til rakstur og íløgur. Málið datt burtur í sambandi við løgtingsvalið, men verður væntandi tikið fram aftur.

Ætlandi skal eftirskúlin rúma uml. 80 næmingum, og byggikostnaðurin er mettur til uml. 90 mió kr.

## Føroyanevndin í Fólkatinginum vitjaði KSF

Føroyanevndin í Fólkatinginum vitjaði í summar og hevði m.a. fund við KSF til tess at kunna seg um føroysk kommunuviðurskifti.

Fundur varð hildin 20. august 2007 í Norðurlandahúsinum. Kirstin Strøm Bech, næstformaður í KSF, bjóðaði vælkomin, og Jóan Petur Hentze, aðalskrivari, hevði framløgu um kommunubygnaðin, ábyrgdar- og uppgávubýtið og kommunalu búskaparviðurskiftini. Eisini greiddi hann frá framtíðarútlitunum hesum viðvíkjandi. Á ferðini vitjar Føroyanevndin m.a. eisini Tvøroyrar kommunu og Runavíkar kommunu.

## Upp í ein leyp av list til føroysk skúlabørn

Norðurlandahúsið í Føroyum, KSF og Føroya Kommunufelag hava skrivað undir samstarvsavtalu um eina 3 ára royndarverkætlan við heitinum Listaleypurin.

Listaleypurin er ein nýskapandi verkætlan við tí endamáli at geva fólkaskúlanæmingum høvi at uppliva góða yrkislist. Fyrimyndin er norsk – “den kulturelle skolesekken”, sum hevur havt alstóran týdning bæði fyri listaliga virksemið í Noregi eins og norska skúlaskapin sum heild.

KSF og kommunurnar vilja við verkætlanini stuðla undir nýskapandi samstarv millum mentan, list og skúla.

Verkætlanin hevur eina árliga fígging uppá 450.000 kr., sum verður býtt í javnstórar partar millum kommunurnar, Norðurlandahúsið í Føroyum og Mentamálaráðið. Vónin er, at verkætlanin mennist, og at ein enn størri Listaleypur heldur fram eftir 2010.

## Prinsipiell mál um vatn- og havnagjald

Tvey mál um havnagjald og vatngjald hjá Tvøroyrar kommunu hava stóran prinsipiellan týdning eisini fyri aðrar kommunur og kommunalar havnir. Í báðum málum hevur KSF veitt løgfrøðiliga ráðgeving, tó eisini við hollari hjálp frá limakommununum.

# KSF HEVUR GJØRT SÁTTMÁLA UM TALUTÆNASTU Á HEIMASÍÐUNUM HJÁ KSF OG LIMAKOMMUNUNUM



Landið hevur alt síðan nýggi Smyril kom á heysti 2005 hildið uppá, at landið er ikki skyldugt at gjalda havnagjald til Tvøroyrar havn. Støðan hjá landinum er grundað á eina grundleggjandi og eyðsýnda misskiljing, har landið ikki skilir millum hugtøkini havn og bryggja.

KSF hevur lýst og greinað hugtøkini og grundleggjandi rættarstøðuna á økinum fyri Innlendismálaráðnum. Hóast landið eigur nýggju bryggjuna á Krambatanga á Trongisvágsfirði, so frítekur hetta ikki landinum fyri skylduna at gjalda havnagjald fyri brúkið av siglingarleiðini inn gjøgnum Tvøroyrar havn, ið kommunan sum havnamyndugleiki umsitur og hevur útreiðslur av.

Endalig loysn ella niðurstøða í málinum verður ikki, fyrr enn kommunan enn einaferð hevur sett seg í samband við myndugleikarnar á økinum, helst nakað skjótt eftir, at nýggj leiðsla er sett á Strandfaraskipum Landsins.

Í spurninginum um vatngjald hava Strandfaraskip Landsins og Landsverk eisini noktað at gjalda vatngjald fyri vatnið, sum verður latið av bryggjuni á Krambatanga til Smyril. Landsmyndugleikarnir halda aftur her uppá, at tá bryggjan á Krambatanga er lands, og landið uttan treytir hevur fingið loyvi til at binda í kommunalu vatnleiðingina, so er ongin skylda at gjalda vatngjald.

Her er at siga, at íbindingarloyvið onki hevur við sjálva skylduna at gjalda vatngjald at gera, tí hetta er ein grundleggjandi og siðvenjubundin skylda, sum øll skip virða, bæði lokal og fremmand. Tvøroyrar kommuna er í løtuni, stuðlað av KSF, í sak við Strandfaraskip Landsins og Landsverk um vatngjaldið, og verður eitt úrslit væntandi á vári 2008.

## Heimasíðurnar tosa

KSF hevur gjørt sáttmála um talutænastu á heimasíðunum hjá KSF og limakommununum. Talan er um tøkni, sum lesur upp tekst á heimasíðum. Talutænastan er føroysk, og hjá brúkarum krevst eingin eyka forritan ella útgerð.

KSF tók hetta stig til tess at tryggja og betra atkomuna til heimasíðurnar hjá øllum vitjandi, sum hava lesitrupulleikar av einum og hvørjum slagi. Sambært OECD verður mett, at eini 10–15% av fólkinum hava lesitrupulleikar.

Sum myndugleiki hava kommunurnar upplýsingarskyldu mótvegis øllum borgarum. Gongdin er eisini tann, at heimasíðan er høvuðs kunningar- og upplýsingarmiðil, og kommunurnar hava tí serliga ábyrgd fyri teimum borgarum, ið hava lesitrupulleikar.

Higartil hava heimasíðurnar hjá KSF, Tórshavnar kommunu, Klaksvíkar kommunu, Runavíkar kommunu, Fuglafjarðar kommunu og Vágs kommunu fingið føroysku talutænastu, og afturmeldingarnar hava verið sera positivar. Eisini kommunalir stovnar hava møguleika at gerast partur av sáttmálanum hjá KSF.

## Undirvísingarportalurin

Á heystið 2006 skrivaðu KSF, Mentamálaráðið og Kommunufelagið undir 3 ára samstarvsavtalu um at skipa ein undirvísingarportal. Lærarar, næmingar, foreldur og almenningur annars skulu við hesum fáa atgongd til á móðurmálinum at finna alskyns upplýsingar, umframt alt teldutøkt undirvísingartilfar á føroyskum – eisini við interaktivari tøkni og um aðrar miðlar, eitt nú film og ljóð.

Skúlabókagrunnurin stendur fyri praktiska arbeiðinum. Stýringarbólkurin, har KSF er umboðað, hevur avgjørt, at portalurin skal verða ríkin professionelt, tí hetta skal verða dygdargóð tænasta til fólkaskúlan og borgararnar. Tí er eisini sera týdningarmikið, at almenningurin verður gjørdur kunnugur við tær tænastur, sum portalurin fer at veita. Fleiri kanningar verða nú gjørdar um samstarv við stovnar, veitarar v.m.

Kommunurnar rinda árliga 0,5 mió kr. til Undirvísingarportalin.

## Skeið, evnisdagar v.m.

Skeið, evnisdagar v.m., sum KSF hevur skipað fyri, og tal av luttakarum til hvørt tiltakið:

| | **Luttakarar** |
|---|---|
| Evnisdagur um námsfrøðiligar læriætlanir á barnaansingarøkinum | 130 |
| Skeið í almennum innliti | 22 |
| Skeið í fyrisitingarlóg | 15 |
| Skeið í byggimálsviðgerð og ognartøku | 19 |
| Skeið í coaching | 14 |
| Skeið í kommunurætti | 18 |
| Skeið í 1. hjálp | 120 |
| Seminar um føroyskan kommunupolitikk* | 50 |
| Evnisdagur um felags journalplan** | 30 |
| | **418** |

** Fyriskipað saman við Fróðskaparsetri Føroya og Føroya Kommunufelag*

*** Fyriskipað saman við Føroya Kommunufelag*

# Hoyringar

Uppskot til løgtingslóg og kunngerð sent KSF til hoyringar:

## Almanna- og heilsumálaráðið

| | |
|---|---|
| Januar: | Kunngerð um eldrasambýli |
| | Kunngerð um røktarheim |
| Mai: | Løgtingslóg um lutaíbúðafeløg |
| Juli: | Broyting í forsorgarlógini – vardir bústaðir skipað sum serstakt lutaíbúðafelag |
| | Løgtingslóg um ókeypis koppseting móti ávísum smittandi sjúkum |
| September: | Løgtingslóg um útleigan av bústaðum (leigulógin) |
| | Løgtingslóg um tiltøk at minka um tubbaksnýtsluna (tubbakslógin) |
| Oktober: | Løgtingslóg um fyrisitingarliga frælsistøku innan psykiatriina (psykiatrilógin) |
| November: | Kunngerð um eldrasambýli |
| | Kunngerð um røktarheim |

## Innlendismálaráðið

| | |
|---|---|
| Februar: | Broytingar í býarskipanarlógini |
| Mars: | Kunngerð um roknskaparhald v.m. hjá kommununum |
| September: | Kunngerð um bunkring av olju í føroyskum havnum og á sjónum |
| | Løgtingslóg um náttúruvernd |
| November: | Kunngerð um roknskaparhald v.m. hjá kommununum |

## Løgmansskrivstovan

| | |
|---|---|
| Februar: | Visjón 2015 |

## Mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Mars: | Broytingar í fólkaskúlalógini |
| Oktober: | Løgtingslóg um stuðul til høli og verkløg til ítrótt og mentan |
| | Broyting í løgtingslóg um eftirskúlar |
| November: | Broyting í løgtingslóg um eftirskúlar |

## Vinnumálaráðið

| | |
|---|---|
| Januar: | Løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (elveitingarlógin) |
| | Løgtingslóg um kapping (kappingarlógin) |
| Mars: | Løgtinsglóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (elveitingarlógin) |
| Juli: | Løgtingslóg um havnir |
| | Løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin) |
| August: | Løgtingslóg um at taka av lóg um privata arbeiðsávísing |
| September: | Løgtingslóg um løggildar og skrásettar grannskoðarar |
| November: | Kunngerð um víðarilatan av heimildum til Kappingareftirlitið viðvíkjandi elektroniskum samskifti |
| | Kunngerð um starvs- og fundarskipan fyri Kappingarráðið |
| | Kunngerð um avtalur v.m. innan somu fyritøku ella samtøku |
| | Kunngerð um útrokning av umsetningi í kappingarlógini |
| | Kunngerð um afturgjalding av stuðli veittur ávísum almennum fyritøkum |
| - | Kunngerð um virksemið hjá Kappingareftirlitinum |
| - | Løgtingslóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakarum um treytirnar fyri setanarviðurskiftum |

*Øll svarskriv eru at lesa á www.ksf.fo*

# Um KSF

## Limakommunur

Tórshavnar kommuna, www.torshavn.fo

Klaksvíkar kommuna, www.klaksvik.fo

Runavíkar kommuna, www.runavik.fo

Tvøroyrar kommuna, www.tvoroyri.fo

Fuglafjarðar kommuna, www.fuglafjordur.fo

Vágs kommuna, www.vagur.fo

Sands kommuna, www.sandur.fo

## Stýrið

Heðin Mortensen, formaður, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu

Kirstin Strøm Bech, næstformaður, borgarstjóri í Vágs kommunu

Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvíkar kommunu

Hans Jacob Lamhauge, borgarstjóri í Runavíkar kommunu

Kristin Michelsen, borgarstjóri í Tvøroyrar kommunu

Sigurd S. Simonsen, borgarstjóri í Fuglafjarðar kommunu

Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri í Sands kommunu

## Starvsbólkur

Jens Marius Poulsen, formaður, kommunustjóri í Tórshavnar kommunu

John Færø, býráðsskrivari í Klaksvíkar kommunu

Dinna Jensen, býráðsskrivari í Runavíkar kommunu

Óli Debes, býráðsskrivari í Tvøroyrar kommunu

Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari í Fuglafjarðar kommunu

Petry Joensen, býráðsskrivari í Vágs kommunu

Marnar Højsted, umsitingarleiðari í Sands kommunu

## Starvsfólk í KSF

Jóan Petur Hentze, aðalskrivari

Bárður Larsen, løgfrøðiligur ráðgevi

Armgarð H. Godtfred, skrivari

# Umboð fyri KSF í ráðum, nevndum v.m.

| | |
|---|---|
| **Kommunala Arbeiðsgevarafelagið** | Heðin Mortensen, Tórshavnar kommuna |
| | Kristin Michelsen, Tvøroyrar kommuna |
| | Kirstin Strøm Bech, Vágs kommuna |
| **Barnaverndarstovan** | Heðin Mortensen, Tórshavnar kommuna |
| **Ráðið fyri Brekað** | Steinbjørn O. Jacobsen, Klaksvíkar kommuna |
| | Kirstin Strøm Bech, Vágs kommuna (varalimur) |
| **Býarskipanarnevndin** | Eliesar Kastalag, Runavíkar kommuna |
| | Rúna Hilduberg, Tórshavnar kommuna (varalimur) |
| **Toll- og skattaráðið** | Jens Marius Poulsen, Tórshavnar kommuna |
| | John Færø, Klaksvíkar kommuna |
| **Útbúgvingarráð fyri sløkkiliðsfólk** | Kartni Jacobsen, Tórshavnar kommuna |
| | Finn Hansen, Klaksvíkar kommuna (varalimur) |
| **Demokratia** | Steinbjørn O. Jacobsen, Klaksvíkar kommuna |
| **Undirvísingarportalurin** | Kirstin Strøm Bech, Vágs kommuna |
| | Dávur Winther, Klaksvíkar kommuna (varalimur) |
| **Listaleypurin** | Jóan Petur Hentze, KSF |
| **Talgild Heilsuskipan** | Jóan Petur Hentze, KSF |
| **Alarmsentralur** | Heðin Mortensen, Tórshavnar kommuna |
| | Bárður Larsen, KSF |
| **Bókasavnslógin at endurskoða** | Jóan Petur Hentze, KSF |
| | Anna Brimnes, Tórshavnar kommuna |
| **PISA-bólkur fólkaskúlin** | Jóan Petur Hentze, KSF |
| **Ferðslutrygdarætlan fyri Føroyar** | Jákup Egholm Hansen, Tórshavnar kommuna |
| | Hanus Poulsen, Klaksvíkar kommuna |
| **Fólkateljing** | Bárður Larsen, KSF |
| **SSP-samstarv** | Heðin Mortensen, Tórshavnar kommuna |
| | Jóan Petur Hentze, KSF |
| **Eftirskúli í Hvalba** | Jens Marius Poulsen, Tórshavnar kommuna |
| **Felags tilbúgvingarleistur** | Bárður Larsen, KSF |
| **TETRA verkætlanarbólkur** | Kartni Jacobsen, Tórshavnar kommuna |

Kommunusamskipan
Føroya

www.ksf.fo

SENDISTOVAN